Vikuskiftis Sosialurin





## Taparin í X Factor í kvøld

Veddifyritøkurnar er púra samdar um, hvør rýkur úr donsku X Factor kappingini í kvøld. Nú eru bert seks luttakarar eftir, og ein av teimum er Anna Nygaard. Veddifyritøkurnar, sum lata fólk gita, hvør rýkur úr X Factor í kvøld, hava lægsta odds á Daniel. Bet365, Danske Spil og Ladbrokes hava øll Daniel sum greiðan favoritt til at tapa umfarið í kvøld. Í hølunum á honum er Tine, og síðani koma The Fireflies. Veddifyritøkurnar hava stórt álit á, at føroyska Anna Nygaard fer víðari í kappingini í kvøld, og favorittarnir til at vinna eru framvegis Thomas og Jesper. Bet365 metir soleiðis um, hvør rýkur úr X Factor í kvøld: Daniel (1.40), Tine (5.50), The Fireflies (7.0), Anna (11) Jesper (25) og Thomas (50).

# Leita enn eftir undirskriftum

**Enn hevur ikki eydnast at finna 14 løgtingslimir at skriva undir upp á, at kanningarstjóri skal setast at kanna um Edmund Joensen, Anfinn Kallsberg, Jóannes Eidesgaard og Kaj Leo Johannesen hava misrøkt sínar skyldur**

KANNINGARSTJÓRI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Enn er ikki greitt um kanningarstjóri verður settur at kanna um allir teir, sum hava verið løgmenn í Føroyum seinastu 15 árini, hava misrøkt sínar skyldur ella ikki.

Í nakrar dagar hevur ein bólkur av løgtingslimum við Magna Laksáfoss á odda, roynt at fáa 14 løgtingslimir at skriva undir eina áheitan á løgtingsformannin um at seta ein kanningarstjóra at kanna embætisførsluna hjá teimum fýra løgmonnunum, sum hava sitið síðani nýggja stýrisskipanin kom í gildi á ólavsøku í 2005.

Talan er um teir fýra Edmund Joensen, Anfinn Kallsberg, Jóannes Eidesgaard og Kaj Leo Johannesen.

### Løgmenn ella lógin

Magni Laksáfoss heldur, at kanningin er neyðug fyri at staðfesta, hvussu tað ber til, at so stór meirnýtsla kann fara fram ár um ár, um tað eru løgmenninir, sum ikki hava røkt sína eftirlitsskyldu ella um tað er stýrisskipanin, sum ikki er nóg neyvt orðað.

Men verður ein kanning sett í verk, er óvist um hon skal fáa nakrar avleiðingar, tí tað stendur til Løgtingið at avgera, sigur Magni Laksáfoss.

Tað, sum hesin bólkurin av løgtingslimum vil hava endaliga staðfest, er, um teir fýra hava røkt sínar eftirlitsskyldu mótvegis landsstýrisfólkunum nóg væl.

Tað, sum bólkurin hugsar mest um, er tann velduga meirnýtslan, sum hevur verið á fíggjarlógini seinastu árini.

Tað er løgmaður, sum hevur eftirlit við landsstýrisfólkunum og bólkurin vil hava at staðfest um teir hava røkt hesa eftirlitsskylduna nógv væl, tá ið hendan meirnýtsla kundi fara fram ár um ár.

Magni Laksáfoss heldur, at kanningin er neyðug fyri at staðfesta, hvussu tað ber til, at so stór meirnýtsla kann fara fram ár um ár, um tað eru løgmenninir, sum ikki hava røkt sína eftirlitsskyldu ella um tað er stýrisskipanin, sum ikki er nóg neyvt orðað.

Men verður ein kanning sett í verk, er óvist um hon skal fáa nakrar avleiðingar, tí tað stendur til Løgtingið at avgera, sigur Magni Laksáfoss.

Fyri at fáa ein kanningarstjóra settan, krevst, at 2/5 av løgtinginum skriva undir eina áheitan á løgtingsformannin og so skal hann tilnevna ein kanningarstjóra.

Sostatt skulu 14 undirskriftir til at fáa ein kanningarstjóra.

### Mangla nakrar enn

Roynt varð at lodda dýpið í tinginum týsdagin og tá segði Magni Laksáfoss, mikudagurin fór at gerast nokk av avgerandi.

Men nú er mikudagurin farin aftur um og enn hevur ikki eydnast at finna 14 tingfólk, at skriva undir eina áheitan um kanningarstjóra.

Magni Laksáfoss vil ikki siga, hvussu nógvar undirskriftir mangla. Hann vil heldur ikki siga, hvør hevur skrivað undir.

Hann váttar kortini, at nakrar undirskriftir mangla enn og hann sigur samstundis, at flestu tingfólkini eru spurd.

Men hann hevur áður fortalt fyri Sosialinum, at í samgonguni hava bæði hann og Edmund Joensen skrivað undir – og Edmund er altso tann eini av løgmonnunum, sum skulu kannast.

Hann sigur, at nú verður kannað eftir um fleiri hava hug at skriva undir og hinvegin eru tað heldur ikki øll, sum enn hava tikið støðu.

Men hann sigur, at í næstu viku fæst at vita um tað verður egg ella ungi.

Tað kemur ikki so øgiliga óvart á hann at tað tekur sína tíð at finna undirskriftir, tí hetta er eitt rættiliga prinsipielt mál.

Annars hevur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi boðað frá, at ein kanning er avgjørd neyðug fyri at staðfesta ábyrgdina fyri meirnýtsluni.

Men tað er ikki vist, at øll andstøðan tekur undir við kanningini heldur, tí Heini O. Heinesen hevur sagt, at hann sær onki endamál í hesum uttan at fylla lumman hjá onkrum løgfrøðingi.



*Edmund Joensen hevur skrivað undir upp á, at hann skal kannast fyri at vita um hann misrøkti sína skyldu, tá ið hann var løgmaður*

# Hergeir undrast ikki

**Tað undrar ikki løgtingsformannin, at tinglimir vilja kanna um tað er løgmaður, sum hevur skyldina av, at tey ymsu landsstýrisfólkini hvørt ár brúka nógv meiri pening, enn tey hava játtan til**

KANNINGARSTJÓRI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, heldur ikki, at tað er undarligt, at tinglimir vilja hava ein kanningarstjóra at kanna um teir fýra løgmenninir, sum hava sitið síðani nýggja stýrisskipanin kom í gildi í 1995, hava misrøkt sína skyldu.

Sum vit greiða frá í hinari greinini, er orsøkin til, at kanningarstjóri skal setast, tann, at landsstýrið hvørt ár hevur brúkt meiri pening, enn tey hava havt játtan til og nú vil ein bólkur av løgtingsmonnum hava kanningarstjóra at kanna um løgmenninir hava misrøkt sína eftirlitskyldu.

Hann sigur, at fær hann eina áheitan frá 14 tinglimum, fer hann sjálvandi at seta ein kanningarstjóra.

- Fái eg 14 undirskriftir má tað sigast at vera ein nóg stórur partur av tinginum, sum vil hava eina kanning og so verður hon sett í verk.

Hann dugir ikki at siga upp á standandi fót um løgtingsformaðurin kann seta ein kanningarstjóra av sínum eintingum.

Men undir øllum umstøðum hevði hann sjálvur neyvan tikið stig til at seta ein kanningarstjóra.

- Tað er ikki nakað, sum liggur so frammaliga í mínum hugaheimi, sigur Hergeir Nielsen.

### Undrar hann ikki

Men at tinglimir vilja hava ein kanningarstjóra, skilir hann væl.

- Politiskt er onki at undrast á, at tær afturvendandi atfinningarnar hjá grannskoðarunum um yvirnýtsla fáa tinglimir at ressast.

- Tá ið stýrisskipanin varð gjørd mitt í nítiárunum, varð rættiliga nógv tosað um, at nú mátti landsstýrið ansað sera væl eftir ikki at brúka meiri pening, enn játtað var á fíggjarlógini.

- Og varð nøkur óheimiðlað meirnýtsla staðfest, skuldi tað fáa hóskandi avleiðingarnar.

- Nú verður akkurát sama grundgeving brúkt fyri at verja óheimiðlaða meirnýtslu, tí nú verður sagt, at tað hevur altíð verið vanligt, at brúka meiri pengar enn játtað hevur verið á fíggjarlógini, uttan at tað hevur fingið avleiðingar, so tað er ongin saklig orsøk til, at tað skal fáa avleiðingar nú, staðfestir løgtingsformaðurin.

- Og nú ber illa til at krevja, at løgmaður skal taka sína eftirlitsskyldu á hesum øki í álvara, tí tá ið løgmaður hevur latið tað ganga fleiri ferðir, hví skal hann so pilka okkurt einstakt landsstýrisfólk burtur úr nú og revsa tey, leggur hann afturat.